## Vunnu 3-0 á Íslandi

Føroyska U- 19 liðið hjá gentum í flogbólti vunnu í morgun 3-0 á Íslandi. Sigurin var rættuliga greiður, og settini endaðu 25-16, 25-19 og 25 - 21. Føroyar skulu aftur í eldin kl. 13,00 føroyska tíð, tá mótstøðuliðið er Noreg.

Dysturin verður møguliga avgerandi fyri hvør vinnur 2.,3. ella 4. plássið í kappingini. Teir í leiktu á føroyska liðnum í morgun vóru: Hevari: Elin Weihe, miðjur: Elisabeth Purkhús,Heidi Christiansen og Sóley Poulsen, Kantar: Simonika Hammer, Anja Danielsen og Vivian Joensen, Diagonalar: Birgit Guttesen og Sofía Purkhús.



## Sveits til HM

Við at spæla málleysan javnleik á heimavølli móti Ísrael vann Sveits sær í gjár tað eina stigið, sum skuldi til, fyri at vinna sær beinleiðis atgongd til HM-endaspælið í fótbólti. Ikki færri enn níggju gul og eitt reytt kort varð givið í dystinum, og úrslitið merkir samstundis, at Ísrael endaði á einum nyttuleysum triðjaplássi. Nummar tvey í bólkinum gjørdist Grikkaland, sum soleiðis skal spæla play-off dystir.

# Øgiligi Egil

**35 ár, 11 dystir og eitt mál. Soleiðis síggja hagtølini út hjá Egil á Bø, sum ikki veit hvussu framtíðin sær út**




Rólant Waag Dam

**Piatra Neamt, Rumenia:** Hann er gamal áleypari og plagar at vera góður fyri nøkur mál um árið í landskappingini. Í gjárkvøldið skoraði hann fyrsta málið á landsliðnum. – Ja, tað er eitt sindur øðrvísi. Tað er ikki á hvørjum degi, at eg skori mál og tað er so fyrsta ferðin á landsliðnum, at eg royni tað, segði Egil á Bø smílandi eftir dystin.

Hansara mál munaði tó lítið í móti teimum trimum rumensku málunum.

– Eg veit ikki heilt, hvat eg skal siga til tað. Eg harmist altíð um, at mótstøðuliðini fáa mál. Eg haldi eisini, at vit kundu vart betri fyri við onkrum av málunum. Ikki tí, teir vóru nokk betri enn vit, men okkurt mál, teir fingu var heldur bíligt, sigur Egil á Bø, sum tó var rímiliga væl nøgdur við avrikið hjá sínum liðfeløgum.

– Vit spæla hampiliga væl til tíðir og verja eisini væl. Vit royndu allir og eg haldi ikki tað var heilt av leið, heldur hann.



Egil á Bø við bláum eyga eftir nærdyst við Anelka leygarkvøldið

Mynd: Rólant Waag Dam

Eitt er at meta um avrikið hjá sínum liðfeløgum, annað er at taka støðu til egna framtíð. Tað er ikki heilt lætt.

– Eg blívi so ikki yngri og eri eisini nokkso gamal eftir hondini. Tankin um at gevast liggur nokkso nær, men eg havi ikki tikið støðu til tann spurningin enn, sigur Egil á Bø, sum leggur aftrat, at tað verður helst rættiliga skjótt, at hann hevur gjørt av, hvussu verður við honum og fótbólti á hægsta stigi næsta ár.

# Nøgdur við avrik og innsats

**Brian Kerr, landsliðs-venjari, harmast um bíligu málini, men er nøgdur við føroyska avrikið og innsatsin**

**Piatra Neamt, Rumenia:** - Hatta vóru nøkur bílig mál og tað skuffar meg. Men soleiðis er tað helst altíð sum venjari, tú kanst ongantíð góðtaka tey málini, tú fært í móti tær, sigur Brian Kerr, landsliðsvenjari.

Hann er tó nøgdur við avrikið og innsatsin hjá sínum monnum, og fegnast um málið hjá Egili á Bø.

– Tað er positivt, at vit fáa eitt mál. Vit hava eisini styrkina nú til at skora, og eg haldi at teir ræddust okkum í deyðbóltsstøðum. Tíverri fingu vit ikki eitt einasta hornaspark, men eg eri vísur í, at fingu vit tað, so var mál, sigur Brian Kerr við einum skeivum smíli.

Somuleiðis er hann eisini sera nøgdur við mátan, føroyska liðið vardi upp á í deyðbóltsstøðum.

– Teir hava eitt ótal av deyðbóltum í góðum støðum, men vit megna at vinna allar hesar bóltarnar, sigur Brian Kerr, sum harmast um skaðan, Jákup á Borg fekk móti dystarenda.

– Tað er sera keðiligt, tí høvdu vit havt ein mann aftrat á vøllinum hesa løtuna, vit skora, so høvdu vit kanska eisini fingið ein kjans aftrat.

**Rólant**



Brian Kerr, landsliðsvenjari, hevur blandaðar kenslur eftir dystin

Mynd: Rólant Waag Dam

# Møguligt beinbrot hjá Jákupi



**Ein ófantalig stempling, ein hovin fótliður og stór sár á skinnabeininum. Landsliðslæknin vildi ikki útiloka eitt møguligt beinbrot hjá Jákup á Borg**

**Piatra Neamt, Rumenia:** Hóast harmur, troyttur og pínu í beininum, so hevði Jákup á Borg kortini yvirskot til at skemta eitt sindur eftir dystin í gjár.

– Eg skuldi als ikki verið komin inn aftur. Vit skora jú meðan eg fái viðgerð uttanfyri vøllin, og teir skora so skjótt eg eri komin inn aftur, segði hann flennandi.

Jákup á Borg varð stempladur ógvuliga ófantaliga og var uttanfyri vøllin í fleiri minuttir, áðrenn hann kom inn aftur beint fyri leiklok. Hesa løtuna hevði Egil á Bø minkað um munin, men Jákup á Borg var ikki meira enn komin á vøllin, so økti Rumenia um leiðsluna.

– Eg fekk als ikki spælt, men vit høvdu brúkt allar útskiftingarnar, so eg kom inn aftur og skuldi royna at órógva bara eitt lítið sindur, men tað var ógjørligt hjá mær, sigur Jákup á Borg um skaðan.

Hann gekk á høkjum eftir dystin og hevði nógva pínu. Læknin hjá landsliðnum, Absalon Eysturoy roknaði ikki við, at talan var um beinbrot, men hetta fingu teir ikki staðfest í gjárkvøldi.

Hetta er einki serligt hjá Jákup á Borg, sum heldur ikki var nøgdur við tað, sum fór fram á vøllinum í gjárkvøldi.

– Eg eri ónøgdur við úrslitið og ónøgdur við meg sjálvan. Teir skapa ikki so nógv og vit tora ov lítið. Teirra mál eru eisini ov løtt, og tað skal tað ikki vera í móti okkum, sigur Jákup á Borg.

**Rólant**